# Vit savnast um tónleikin

**Jens Lisberg hevur útgivið eina tvífløgu við heitinum »Skýming«. Týskvøldið í farnu viku hevði Jens Lisberg útgávukonsert í Miðlahúsinum. Fitt av fólki komu til konsertina, og Jens heldur at hølini í Miðlahúsinum eru perfekt til tílík tiltøk. Sosialurin hitti Jens Lisberg, og vit prátaðu um konsertina, fløguna og framtíðina**

KONSERT & ÚTGÁVA
*Rókur Jákupsson*
*rokur@sosialurin.fo*



*Serføroyskt í kontri-hami. Tað man vera ein av lýsingunum um Jens Lisberg. Í farnu viku hevði hann eina væl eydnaða útgávukonsert í Miðlahúsinum*

*Mynd: Jan*

Serføroyskt kontri

Hví ger man eina fløgu sum bara hevur gomul løg? Jens greiðir frá at hetta er nakað ið hann hevur havt ætlanir um í rúma tíð. Ja, hví fór eg undir at gera fløguna "Sk‡ming? Eg haldi, at hetta eru løg, sum fólk eru glað fyri, og tí hevur tað leingi verið uppá tal", sigur Jens við blaðmannin.

Løgini á fløguni eru upptikin yvir eitt langt tíðarskeið. Tey fyrstu eru upptikin í 1983 og tey seinastu í 1990, so talan er um eitt tíðarskeið ið hevur upplivað ymisk tónleikalig rák. Men hetta hoyrist ikki so væl aftur á fløguni. Jens Lisberg skrivar og spælir eitt slag av tíðarleysum kontri tónleiki, sum inniheldur okkurt serføroyskt. Hetta serføroyska hevur blaðmaðurin hug at rópa fyri sjómanna popp/kontri. Løg sum »Eg sjólívið valdi« og »Tú dregur meg sum ein magnetur« eru júst hendan samanrenningin av tónleikasløgum, sum ger tónleikin hjá Jens Lisberg til nakað serføroyskt.

### Ongar nýggjar innspælingar

Jens greiður frá, at tað hevur ongantíð verið ætlanin at spæla tey gomlu løgini inn av nýggjum. Hetta kemst av, at løgini skulu varðveita sín samleika.

- Eg meti at tað er gott at løgini eru í teirra uppruna hami. Tað hava verið nógvir ymiskir tónleikarar ið hava spælt á teimum ymisku løgunum, og eg vil gjarna varðveita tí somu kensluna í løgunum. Tí kemur tað ikki uppá tal at spæla løgini inn av nýggjum - tað er onkursvegna meiri orginalt at hoyra løgini sum tey altíð hava ljóðað. Av tí at har eru heili 40 løg á fløguni, er tað eyðsæð, at har er eitt breitt úrval av tónleiki. Og tí er tað eisini ótrúliga nógvur ymiskur tónleikur á fløguni, og eg vil ikki hava alt spælt inn av nýggjum, tí so hevði allur tónleikurin kanska ljóða ov eins, greiðir Jens frá.

Hann metur annars at fløgan er væl móttikin av fólki.

- Eg haldi at fólk eru glað fyri fløguna. Eg havi hoyrt onkur fólk rósa henni, men eg havi ikki kannað sølutølini ella nakað sovorðið. Í Føroyum ger man ikki eina fløgu fyri peningaligan vinning, sigur Jens Lisberg.

### Útgávukonsert

Fyri einari viku síðan hevði Jens eina útgávukonsert í Miðlahúsinum í Havn. Hann fortelur mær, at hann ongantíð áður hevur spælt hesi løgini live.

- Eg veit ikki hví, men eg havi aldrin spælt nakað av hesum løgum live áður. Eg havi líkasum ikki havt møguleikan til tað. So tað var eg ótrúliga spentur uppá. Og tá ið eg so spældi tey live, tá merkti eg at løgini fingu nakað heilt annað, enn eg eri vanur við. Saman við mær spældu Kristian Blak og Bergur Godtfred, og vit góðu løgunum ein heilt nýggjan ham, sigur Jens.

- Hetta gjørdist ein sera hugnalig løta. Tað var virkiliga stuttligt at so nógv fólk møttu upp til konsertina, og tað vil eg gjarna takka teimum fyri.

Hann er sera glaður fyri konsertina í farnu viku. Hann sigur, at hann heldur at Miðlahúsið er ótrúliga væl egna til tílík endamál.

- Miðlahúsið gevur einum tílíkum tiltakið teir perfektu karmarnar. Har er hugnaligt, góður akustikkur og so er tað heldur ikki ov stórt. Men tað er týdningarmikið at øll mentan sleppur inn í eitt tílíkt stað. Bæði handaligt og andaligt, vísur ein avgjørdur Jens Lisberg á.

### Framtíðin?

Prátið fellur á framtíðina, og Jens er skjótur at taka orðið upp. Hann fortelur mær at vit ikki skulu rokna við, at »Skýming« verður tað síðsta ið vit hoyra frá Jens.

- Eg havi fleiri ætlanir fyri framman. Eg vil fegin gera minst eina fløgu afturat. Á tí fløguni verður allarhelst bara nýggjur tónleikur. Tað havi eg vilja gjørt í langa tíð, sigur hann.

Eisini fortelur Jens, at hann fegin vil gera okkurt til frama fyri vælgerandi endamál.

- Eg havi ætlanir um at skipa fyri onkrum tiltøkum, har ið vinningurin fer til vælgerandi endamál. Eg havi longu práta við aðrar tónleikarar um hetta, og tað tykist sum um áhugi er til staðar.

- Tónleikurin kann brúkast til so nógv ymisk, sigur ein heldur filosofiskur Jens Lisberg.

- Tá ið eg var ungur, tá høvdu vit onki sjónvarp. Tá var tónleikurin tað sum javnaldrarnir savnaðust um, og hetta eri eg ótrúliga glaður um í dag. Eg royni eisini at eggja teimum ungu til at gera tað sama, tí at tónleikur er ótrúliga gevandi fyri okkum menniskju, sigur Jens Lisberg at enda.

# Tín saldo umvegis fartelefonina

**Millum virkini í Ungt Virki er Komplex, ið menna eina skipan til at kanna saldoina á tíni bankakonto umvegis fartelefonina.**

UNGT VIRKI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í hesum døgum vísa bólkarnir í Ungt Virki verkætlanini á Føroya Handilsskúla. Virkini fevna breitt, har er alt frá djóraframsýningum til vísorðaløkur, frá rokkfløgum til eina SMS skipan til at kanna bankasaldoina við.

Á básinum hjá unga virkinum Komplex – Text-Response hittu vit fryntligu Rebekku Petersen framleiðslustjóra. Hon greiddi okkum frá um SMS-skipanina, ið tey hava fingið hugskot til. Hetta er ein skipan, har tú við einum SMS boðum kann kanna saldoina á tíni bankakonto.

Rebekka sigur, at bólkurin hevur tosað við Elektron um tøkniligu menningina av skipanini. Menningin av skipanini er komin heilt væl áleiðis. Valið av Elektron sum tøkniligum samstarvsfelaga var fyrst og fremst orsakað av tí trygdini, ið Elektron er kent fyri at veita, sigur Rebekka. Her er talan um upplýsingar, ið skulu vera tryggjaðir sera væl, og hetta er eitt øki, ið Elektron hevur serkunnleika á.

Mannagongdin er einføld. Tú skrásetir teg í tínum peningastovni og fært eitt loyniorð sendandi við posti, á sama hátt sum við loynitølunum til FR-Kortið. Tú fert síðan inn á heimasíðuna hjá skipanini, og ritar teg inn á tína brúkarasíðu. Har ber til at velja tænastur. T.d. kanst tú velja at fáa eini SMS boð sendandi hvønn dag, hvørja ferð saldoin fer um eina ávísa upphædd ella hvørja ferð peningur verður fluttur á kontoina.

Rebekka sigur, at møguleikarnir eru nógvir við skipanini. Komplex hevur sett seg í samband við peningastovnarnir. Hesir eru somuleiðis áhugaðir í skipanini. Hon greiðir frá, at ein av peningastovnunum kemur at hyggja at skipanini seinnapartin í dag.

Eingin í bólkinum er forritari, men hetta er ikki ein trupulleiki. Tí tað er ikki tann tøkniliga partin av skipanini, ið Komplex tekur sær av. Tey standa fyri hugskotsmenningini og marknaðarføring av skipanini.

### Ungt Virki frá teori til praksis

Rebekka heldur Ungt Virki verkætlanina vera frálíka. Hetta er ein møguleiki hjá næmingunum at royna tað, ið tey læra í hinum lærugreinunum í praksis. Hetta læra vit nógv av, sigur hon. Hon heldur tó ikki, at tíðin, ið er sett av til verkætlanina, er so góð, sum hevði verið ynskiligt.

Hon sigur, at hetta var ikki fyrsta hugskotið, ið tey fingu.




*Rebekka Petersen er framleiðslustjóri í Komplex*

Áðrenn hetta hugskotið varð valt, høvdu tey m.a. tosað um føroyskt rabarbusúltutoy og ein skepikjøtshaldara, men hetta var jú gjørt áður. Komplex eru Levi Hansen (stjóri), Rebekka Petersen (framleiðslustjóri), Óli Poulsen (roknskaparleiðari) og Ann-Rósa á Rógvu (Søluleiðari).